## Kadima vann við einum



Í Ísrael er flokkurin Kadima hjá Tzipi Livni, uttanríkisráðharra størstur aftan á valið í gjár. Flokkurin fekk 28 umboð í Knesset. Men sigurin var sera tepur, tí flokkurin Likud hjá fyrrverandi forsætisráðharranum Benjamin Netanyahu fekk 27 tinglimir. Tað merkir, at Kadima misti ein tinglim, meðan tingmanningin hjá Likud er meiri enn tvífaldað. Høgraflokkurin Israel Beitenu hevur fingið 15 sessir í Knesset, og Arbeiðaraflokkurin, sum fekk eitt sera vánaligt fekkl, hevur fingið 13 tinglimir. Flokkurin hevði 18 frammanundan, og nú verður gitt, at formaðurin, Ehud Barak, noyðist frá. Bæði Tzipi Livni og Benjamin Netanyahu søgdu seg í nátt hava vunnið valið. Tzipi Livni vildi vera við, at veljararnir høvdu valt Kadima til at standa á odda fyri teirri næstu stjórnini. Netanyahu segði harafturímóti, at hansara flokkur hevði fingið so stóra framgongd, at tað var eitt týðiligt tekin um, hvønn veljararnir vildu hava. Danski Miðeystur-eygleiðarin Peter Seeberg heldur tað vera mest sannlíkt, at Ísrael fær eina breiða samgongustjórn við Kadima og Likud og kanska eisini Arbeiðaraflokkinum.

# Treytað revsing fyri hópslagsmál

**Tveir ungir menn vórðu í Føroya Rætti í dag dømdir treytaða fongsulsrevsing fyri at hava verið við í einum hópslagsmáli ein junimorgun í fjør. Grundarlagið var so ótrygt, at dómarin valdi ikki at áseta nakra revsing, men bert eina eitt ára royndartíð**

RÆTTURIN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað, sum byrjaði við einari forhánisligari viðmerking um orange hár, endaði í hópslagsmálið, har millum fimm og tíggju føroyskir unglingar hevndu seg inn á tveir javnaldrandi íslendingar.

Nógv ungfólk høvdu verið í býnum hetta fríggjakvøldið, og tíðliga leygarmorgun savnaðust mong saman í Steinatúni, summi fyri at finna sær ein hýruvogn at koyra seg til hús, onnur fyri at keypa sær ein bita at eta, áðrenn leiðin gekk heim undir dýnuna.

Uttan fyri kioskina hjá Náttarravnunum hitti annar ákærdi ein vinmann, sum hann fall í prát við. Ein viðmerking um orange hár hjá einum øðrum vinmanni fekk teir báðar upp at kjakast, og ein íslendingur, sum hevði verið í býnum saman við bróðuri sínum og einum føroyskum pari, vildi leggja seg ímillum, og sveiggjaði við mati framman fyri teimum báðum, sum irriteraðust av hesum. Ákærdi skumpaði ella slegði íslendingin, sum so slegði aftur. Og eftir hetta er eitt sindur ógreitt, hvat í veruleikanum hendi.

Men tað tykist í hvussu er greitt, at bróður hendan íslendingin legði seg út í ósemjuna, og tað kom at ganga álvarsliga út yvir hann, hóast hann verður umrøddur sum stórur maður, minst tveir metrar langur.

### Sorlaður sundur

Hendan ósemjan útviklaði seg til hópslagsmál, sum flutti seg frá Náttarravnunum niðan omanfyri kioskina í Steinatúni. Og sambært vitnunum legðist nú álvarsliga aftrat við føroyskum ungdómi, sum vildi verða við til at hølva hendan íslendingin av.

Eitt vinti metti, at talan var um einar fimma dreingir, sum løgdu eftir hesum eina íslendinginum, meðan eitt annað vitni helt, at talan í minsta lagi var um tíggju og kanska enntá so nógvar sum tjúgu unglingar, sum allir vóru líka góðir um at sláa hendan eina íslendingin.



*Annar íslendingurin bløddi úr munni og nøs og var bláur og reyður um alt andlitið, meðan bróðurin breyt eina tonn*
*Modellmynd*

Parið, sum fylgdist við íslendingunum, helt seg tó eitt sindur í bakgrundini, men drongurin segði seg síggja, hvussu føroyingarnir bukaðu íslendingin, og at hesin stóð uppi meginpartin av tíðini.

Gentan hinvegin helt, at íslendingurin mátti liggja niðri, tí hon sá hann ikki, og tað hevði hon gjørt, um hann stóð uppi.

Bæði vitnini vóru tó samd um, at tá tey komnu til bukaða íslendingin, var hann illa viðfarin og bløddi úr nøsini og munninum, umframt aðrastaðni í andlitinum. Somuleiðis var hann bæði bláur og reyður um alt andlitið, og ein seinni læknakanning vísti eisini, at hann hevði fingið skaða í andlitið.

### Ikki nøktandi prógv

Ein onnur váttan frá einum tannlækna staðfesti, at hin íslendingurin hevði brotið eina tonn, og tað var tí greitt, at harðskapur var framdur hendan summarmorgunin. Men hvør hevði sligið avgerandi slagið móti hesum íslendinginum og hvør hevði forvolt hinum nógvu skaðarnar í andlitinum, metti dómarin var ikki til at siga.

So hóast ákærin, Finn Ougaard, kravdi teir báðar ákærdu dømdar eftir ákæruritinum, og mælti til eina revsing upp á 30 til 50 dagar fongsul – tó læt hann upp til dómaran at gera av, um revsingin skuldi verða treytað ella treytaleys – so metti dómarin ikki, at prógvini vóru av slíkum slag, at teir ákærdu kundu dømast eftir ákæruritinum.

Verjin hjá tí yngra ákærda – einum 19 ára gomlum – Fríða Patursson, metti ikki, at klientur sín kundi dømast so sum ákærin kravdi, og um rætturin kortini fann ákærda sekan, kundi talan í strangasta føri gerast um treytaða revsing.

Verjin hjá tí 22 ára gamla, sum eisini er bróður til yngra mannin, Petur Even Djurhuus, helt ikki, at klientur hansara á nakran hátt var sekur í ákærunum, og kravdi tí frídøming í málinum.

Dómarin, Henrik Møller, gav partvís verjunum rætt. Hann metti ikki, at grundarlag var fyri at døma teir báðar ákærdu eftir ákæruritinum, tí óvissa um, hvør hevði gjørt hvat, var so stór. So báðir sluppu við einum treytaðum dómi og eitt ára royndartíð. Dómarin valdi somuleiðis ikki at útmála nakra revsing, so teir báðir sluppu so væl, sum teir kundu vónað.

Hvørki ákærin ella teir báðir ákærdu stevndu dómin inn fyri hægri rætt.

# Minnist – minnist ikki

**Í Føroya Rætti í gjár var eisini eitt mál um brot á ferðslulógina viðgjørt. Ákærdi var hin sami, sum eisini stóð ákærdur fyri harðskap; hann noktaði seg sekan, og vitnið, sum var innkallað, tók sínar frágreiðingar til løgregluna aftur, og so mátti málið útsetast**

RÆTTURIN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eina snøgga viku eftir, at 19 ára gamli maðurin hevði verið við í einum hópslagsmáli í miðbýnum í Havn, var hann aftur ákærdur, hesaferð fyri at hava koyrt bil ávirkaður og við ongum koyrikorti.

Í Føroya Rætti í gjár noktaði hann seg sekan og segði, at hann hevði sitið við síðuna av førarasetrinum, og tað einasta hann hevði gjørt var, at traðka beinið yvir um og trýst á speedaran, meðan bilurin stóð stillur í fríkervi.

Saman við trimum øðrum var hann farin biltúr náttina 21. juni og vóru teir endaðir á Gomlurætt. Har var bilførarin farin úr bilinum fyri at kasta sær av vatninum, og tá var tað, at hin ákærdi hevði trýst á speedaran.

Ein annar, sum eisini var við í bilinum, hevði annars greitt løgregluni frá, at hin ákærdi hevði koyrt á Gomlurætt í einar tveir minuttir. Hesa frágreiðing gav hann løgregluni dagin eftir hendingina og hesa somu frágreiðing staðfesti hann aftur fyri løgregluni í einari telefonsamrøðu 11. august.

Ógreiða tykist vera um, hvør koyrdi bilin, tá teir fóru aftur av Gomlurætt. Tá kom ferðin heilt upp á 200 km/tíman, og tað endaði við, at bilurin fór út av vegnum og først ógvuliga illa.

Teir fýra ungu menninir, sum vóru í bilinum, sluppu kortini snikkaleysir frá hendingini, men blóðroyndir vístu, at bæði ákærdi og vitnið høvdu drukkið.

Í rættinum tók vitnið aftur frágreiðingar sínar til løgregluna, bæði hana hann gav dagin eftir, og hana hann gav 11. august. Í rættinum segði vitnið, at hann helst hevði mistikið seg tá hann hevði sagt, at ákærdi koyrdi bilin.

Tá hetta vitnið nú hevði broytt frágreiðing, kravdi ákærin, at málið varð útsett, og at bilførarin, sum hevði koyrt bilin á Gomlurætt, og sum eisini hevði givið frágreiðing til løgregluna, varð kallaður inn sum vitni í málinum.

Enn er ikki greitt, nær málið kemur fyri aftur í Føroya Rætti.